# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Jastrud og Sámal 75 ár



Leygardagin 15. august halda hjúnini Jastrud og Sámal Clementsen 75 + 75 ára føðingardag.

Jastrud fylti 5. august og Sámal 21. september.

Sámal er føddur á Syðradali og flutti til Havnar sum smádrongur, og Jastrup er ættað úr Froðba og flutti til Havnar sum ung.

Sámal er væl kendur frá Postverki Føroya. Hann gekk í mong ár við posti í Havn og kennir so at siga allar gøturnar í býnum. Hann hevur upplivað at hava 25 ára starvsdag í bæði danska og føroyska postverkinum, áðrenn hann legði frá sær vegna pensjónsaldur.

Jastrup starvaðist á Ellisheiminum, til hon gavst vegna aldur. Hon hevur í mong ár havt sum ítrív at mála, bæði postalín, glas og eisini málningar. Hon fekk sær sítt ítriv sum starv eftir pensjónsaldur, tá hon byrjaði at undirvísa í máling hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla. Sámal er oftast við og hjálpir henni við at koyra, bera og seta upp. Tey nærmastu, og onnur við, hava mangan fingið ein hvønn gávulut, sum hon hevur málað.

Børnini eru fimm í tali, barnabørnini eru 15 og langommu- og abbabørnini eru fimm. Í samkomuni Lívdini eru tey trúføst, og annars hava tey nógv at tríva í. Dagurin byrjar sum oftast við einum túri niðri á rennibreytini í Gundadali. At fríðka um húsini og garðin dámar teimum væl, og eru tey sera glað um at vera flutt niðan til Hoyvíkar, har tey hava keypt sær eini minni hús.

Børnini saman við øllum familjum teirra ynskja teimum hjartaliga tillukku vi 75 ára degnum og gleða seg til hendan dagin. Føðingardagurin verður hildin í Starvsmannafelagshúsinum í J.H. Schrøtersgøtu 9, har fólk eru vælkomin at heilsa uppá tey.

†

## Andlát og jarðarferðir

Urnan við **Joen Jacob Gaard Joensen,** vanliga nevndur Jack, fer úr Skopunar kirkju sunnudagin 16. august kl. 14.00.

Kistan við **Nansy Hermansen**, Haldórsvík, fer úr landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Haldórsvíkar Kirkju fríggjadagin kl. 14.00. Tey, ið vilja minnast Nansy, kunnu lata Diabetes Felagnum eina peningagávu konta í peningastovninum.

**Páll Østerø**, fyrrv. bóndi á Trøllanesi, andaðist týsdagin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 76 ára gamal. Bønarhald verður í kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 17.00 Jarðarferðin verður úr Betesta leygarmorgunin kl. 11.00, Tey, ið ynskja at minnast Páll, kunnu lata Barnalegunum í Grønlandi eina gávu konta í peningastovnunum.

# Føroysk djóraljóð í Talent 2009

**Celine Müller hevur nøkur heilt serstøk evni, sum hon fær møguleika at vísa fyri øllum tí danska kongaríkinum. Hon dugir nevniliga at imitera djóraljóð**

KAPPING
*Óli Jákup Jacobsen*



*Celine dugur væl at herma eftir djórum*

Fríggjadagin klokkan 20.00 fer næsta umfar av vælumtóktu undirhaldssendingini 2009 av bakkastokki. Í fjør gjørdist ungi og sjarmerandi havnadrongurin Ragnar Finnson bæði lands- og ríkiskendur fyri sína luttøku í hesari sending. Í ár fáa føroyingar aftur møguleika at fylgja, heppa og stemma uppá ein luttakara av føroyskari ætt við nøkrum heilt serligum evnum, nevniliga Celinu Müller. Hon er tó ikki fødd og uppvaksin í Føroyum, men hevur djúpar røtur til Føroya. Oldurabbi Celinu var kendi havnamaðurin Sørin Emil Müller, sum var ein av stórur reiðari fyrst í 20. øld. Pápi Celinu er Kenneth, sonur Jens Müller, kallaður Pink. Hann er sonur Poul Müller í Havn. Jens og hansara ætt búgva í Jyllinge, ikki so langt frá Keypmannahavn.

Her hevur Jens eisini verið borgmeistari.

### Elskar djór

Celine er ein sannur djóraelskari. Hon brúkar nógv av síni frítíð á natúrustøðini Engen í Lyllinge Nordmark. Her er hon veruliga í essinum saman við øllum djórunum – seyðir, esil, kettir, høsn og kaninir. Hon upptrakkar eisini, har hon hermir eftir eini rúgvu av djórum – apur, hestar, falkar, hundar og mong onnur. Tíðan verri fyri Celine er pápi hennara allergiskur yvir pelsdjórum, so heima má hon sláa seg til tols við tveimum útikaninum og undulatinum Pepe. Hinvegin hevur hon so lært hann at tosa. Hann sigur eitt nú nøvnini í familjuni og dugur at endurtaka mong orð.

### Súreplið fellir stutt frá stammuni

Alskurin til djór kemur ikki frá fremmandum. Tippoldurabbi hennara var Hans Christoffer Müller, sum skrivaði ta fyrstu føroysku fuglabókina. Haraftrat skrivaði han eisini bøkur um grind og fisk, sum tað hevur verið greitt frá í røðini Hendur ið Sleptu. Hann hevði eitt gott og umfatandi samstarv við professor Stenstrup í Keypmannahavn á Zoologisk Museum. Enn tann dag í dag kann ein í gomlu arkivunum finna tað lívliga brævaskifti millum hesar báðar um tað føroyska djóralívið.

### Góða eydnu

Sosialurin vil hervið ynskja Celine alla góða eydnu í sendingini, og vóna vit, at hon kemur langt. Við slíkum djórakennara familjurótum er vónandi longu væl slóðað fyri.



*Tipoldurabbin H.C. Müller var ein av okkara fremstu djórafrøðingum*

## Dagurin

**3. august. Hippolytos**, deyður í umleið 235. Helst ein grikki, sum gjørdist ein av teimum best kendu kristnu rithøvundunum í Róm í 3. øld. Hann var tikin av døgum við at verða slitin millum hestar, sum navn hansara sipar til. Rasmus Rasmussen (á Háskúlanum) varð føddur hendan dagin í 1871.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

